ADVOKATSKRIVSTOVAN

Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Helga á Borg, adv.

Løgtingsins Umboðsmaður
Traðagøta 43
Postsmoga 2008
165 Argir

Tórshavn 12.06.2017
J. nr. 20170371/msj
Skrivari: Elin Svínoy Hansen
els@jura.fo

## Hevur skund

**Viðv. ógilding av flytingum av veiðuloyvum til Næraberg og Slættaberg**

Vegna P/f Næraberg skal eg við hesum venda mær til Løgtingsins Umboðsmann við áheitan um eina skundviðgerð í sambandi við, at Vørn við skrivi frá 9. juni 2017 hevur tikið avgerð um at ógilda flyting av veiðuloyvunum frá Helenu XPSD á Slættaberg OW2333 og frá Eysturoyingi OW2003 á Næraberg OW2072. Nevnda skriv frá Vørn verður heft við.

Vegna P/f Næraberg skal eg gera galdandi, at tá so grovir og týðandi málsviðgerðarfeilir eru hendir í sambandi við avgerðina, eigur tað at viðføra:

**Prinsipalt** at avgerðin er ógildug.

**Subsidiert** at avgerðin ikki eigur at verða tikin, fyrr enn nøktandi málsviðgerð er farin fram.

Sum kunnugt hevur hetta mál verið viðgjørt í pressuni seinastu dagarnar, men tað kom púra óvæntað á klient mín, at hendan avgerðin fór at verða tikin um at taka nøkur loyvir aftur. Beinanvegin undirritaði fekk fráboðan um avgerðina seinasta fríggjadag, tann 9. juni 2017, bað undirritaði um innlit, bæði hjá Vørn og Fiskimálaráðnum, um tað samskifti, sum hevði verið millum Vørn og Fiskimálaráðið. Vørn svaraði beinanvegin, meðan Fiskimálaráðið ikki hevur svarað. Eg hefti við tey skjøl, sum eru móttikin frá Vørn í sambandi við innlitsumbønina. Fyri stutt at taka samanum samskiftið sæst m.a. fylgjandi.

Tann 30. mai 2017 koma boð frá Fiskimálaráðnum til Vørn um, at flyting av veiðuloyvum frá línuskipum yvir á uppisjóarskip fyribils skal steðga.

Við skrivi frá 2. juni 2017 frá Vørn til Fiskimálaráðið verður eftir umbøn givin ein frágreiðing um, hvussu flytingar av veiðuloyvum hjá línuskipum í bólki 3 á uppisjóarskip fara fram.

Fiskimálaráðið gevur við skrivi tann 6. juni 2017 Vørn boð um, at avgerðirnar eru ógildugar, og Fiskimálaráðið heitir á Vørn um at annullera avgerðirnar. Fiskimálaráðið viðmerkir tó, at fyrisitingarlig atlit eru galdandi í hesum høpi, undir hesum reglurnar um partshoyring.

Vørn svarar Fiskimálaráðnum aftur í teldubrævi tann 7. juni 2017 og sigur m.a., at havandi í huga málið um Jógvan S, er tað rættiliga sannlíkt, at ein afturkalling fer at føra til sak um endurgjald, sum reiðaríið fer at vinna. Hetta tí, eins og í málinum um Jógvan S, er borgarin í góðari trúgv og hevur innrættað seg til fiskarí og er í løtuni til fiskiskap. Vørn sigur víðari, at samanumtikið metir Vørn ikki, at avgerðirnar lógliga kunnu afturkallast.

Við telduposti frá 8. juni 2017 gevur Fiskimálaráðið Vørn beinleiðis boð um at gera til einkis (annullera) avgerðina viðvíkjandi flyting av veiðuloyvum av Helenu og Eysturoyingi á Slættaberg og Næraberg. Grundarlagið er, at avgerðirnar eru í ósamsvari við § 8 í lógini um vinnuligan fiskiskap og skulu tí ógildast.

Út frá hesum boðum kemur so avgerðin frá Vørn tann 9. juni 2017 um at taka aftur veiðuloyvini. Sum tað framgongur fyrst í skrivinum, er avgerðin eftir beinleiðis boðum frá Fiskimálaráðnum.

Talan er um sera grovar og eyðsýndar málsviðgerðarfeilir m.a. hesar:

- Manglandi hoyring.
- Manglandi grundgeving.
- Manglandi kæruvegleiðing.

**Ad manglandi hoyring**
Sambært avgerðini frá Vørn tann 9. juni 2017 er avgerð tikin, sum hevur gildi tann 26. juni 2017 kl. 12.00. Tó verður sagt til seinast í skrivinum, at viðmerkingar til freistina ella málið sum heild skulu vera Vørn í hendi í seinasta lagi tann 23. juni 2017. Men tað er greitt, at møguligar viðmerkingar ongan týdning fáa fyri sjálva avgerðina, og tí er ikki talan um nakra veruliga hoyring, tá hon ikki gevur nakra meining.

Harnæst verður einki nevnt í avgerðini um, hví eingin hoyring fer fram, áðrenn avgerðin er tikin, og heldur einki verður nevnt um, at treytirnar sambært § 18, stk. 2 í fyrisitingarlógini eru loknar fyri ikki at hava hoyring.

Tað hevur eftir øllum at døma havt so stóran skund at taka avgerðina, at Vørn sum almennur myndugleiki hevur lopið um hoyringarskylduna orsakað av trýsti og beinleiðis harraboðum úr Fiskimálaráðnum.

Myndugleikin hevur eisini brotið § 19 í fyrisitingarlógini við ikki at hava lokið ásetingina í hesi grein, eins og P/f Næraberg heldur ikki hevur fingið møguleika til at ummæla málið sambært § 20 undir málsviðgerðini, tá klienturin ikki fekk nakra ávaring ella hoyring um, at ætlanin var at taka loyvið aftur.

**Ad manglandi grundgeving**
Myndugleikin hevur eisini brotið ásetingarnar í fyrisitingarlógini, kap. 6 um grundgeving v.m. Sagt verður í avgerðarskrivinum frá Vørn tann 9. juni 2017, at grundarlagið er, at avgerðirnar eru í ósamsvari við § 8 í lóg um vinnuligan fiskiskap. Fyri P/f Næraberg er hetta púra óskiljandi, tí tá Vørn játtaði

umsóknini frá felagnum um flyting av loyvunum, verður júst víst til § 8 í lógini. Samskiftið millum undirritaða og Vørn í sambandi við flyting av loyvunum verður heft við. Hvat tað nú er, sum ger, at § 8 ikki er lokin, fáa vit einki at vita um, og standa tí púra spyrjandi. Um tað nú hvílir á eina aðra meting av § 8 ella tulking, verður ikki nærri útgreinað, hvat hetta gongur út uppá sambært § 23 í fyrisitingarlógini.

**Ad manglandi kæruvegleiðing**
Eingin kæruvegleiðing er í avgerðarskrivinum. Mær vitandi er kærumyndugleikin fyri avgerð hjá Vørn Fiskimálaráðið. Men tað kann so ikki vera galdandi í hesum føri, tá avgerðin reelt er tikin av Fiskimálaráðnum.

Samanumtikið er trupult at fáa eyga á, hvørjir umsitingarligar málsviðgerðarfeilir ikki eru gjørdir, og klientur mín, P/f Næraberg, kann á ongan hátt góðtaka avgerðina.

Hjálagt er:

- Skjøl frá Vørn í sambandi við innlitsumbøn.
- Samskifti millum undirritaða og Vørn í sambandi við flyting av loyvunum.

Tað er umráðandi, at Umboðsmaðurin viðgerð og tekur støðu til málið áðrenn tann 26. juni kl. 12.00, tá loyvini fara úr gildi.

Avrit av hesum skrivi og tilfarinum annars er sent Vørn og Fiskimálaráðnum umvegis teldupost.

Við heilsan

Óla Jákup Kristoffersen, adv.
ojk@jura.fo